tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr
ítróttarskrivari: Emil L. Jacobsen

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo

Prent: Sosialurin

Álop á tey lágløntu

Oddagrein

Peikifingrarnir eru aftur á lofti. Búskapurin skal tálmast. Annars kemur upp á kók. Og sum ikki einaferð er fyrst og fremst ætlanin at leggja eftir teimum lægru inntøkubólkunum. Nú skýtur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum upp at lækka rentustuðulin fyri sethúsalán. Harafturat skulu handverkarar uttanlands missa frádráttin.

Tað kann ikki sigast annað, enn at hugflogið er gott. Men neyvan koma hesi hugskot frá landsstýrismanninum, sum skal syrgja fyri at tað rennur í kassan, samstundis sum hann hevur ábyrgdina av, at tað, sum rennur út, fer í rætta stað. Víst er Tjóðveldisflokkurin drigin í stýriborð, til høgru, men neyvan er hann enn farin so langt, at einastu uppskotini eru at leggja byrðar á tey lágløntu.

Tað er rætt at ansa eftir, at búskapurin ikki fær ov skjót bein at ganga á. Men hann fer at ganga upp aftur skjótari, um ynskini hjá Fólkaflokkinum um størri skattalækkingar skulu fremjast í verki. Sostatt er heldur ikki samljóð millum politikkin hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum á hesum øki.

At lækka rentustuðulin nú fer at raka tey, sum annaðhvørt hava bygt sær hús seinastu árini, ella tey, sum hava keypt sær eini sethús. Tey hava saman við peningastovnunum gjørt eina uppseting, sum sigur, hvussu nógv tey skulu gjalda í rentum og avdráttum tey komandi 15 ella 20 árini. Í henda avdráttarprofil er bygt inn, at rentustuðulin lækkar í stigum eftir ávísum áramáli, men ikki júst nú. Tí kann ein lækking koma tvørt fyri.

Í samrøðu við hetta blað undrast Karsten Hansen á, hví tað almenna skal lata rentustuðul fyri sethúsalán. - Hvat er tann solidariska ella sosiala kjølfestan nú? Til tað er at siga, at mangar familjur høvdu ikki kunnað reist sær eini hús uttan rentustuðulin - ella rentufrádráttin, sum var galdandi til 1. januar 1997.

Eitt annað er, at fíggjarmálastýrið átti at kanna saman við peningastovnum, fakfeløgum, grannskoðarum o.ø. hvørjar avleiðingar tað hevði havt, um rentustuðulin varð avtikin í framtíðini fyri alla nýbygging og alla húsasølu. Tað kann hugsast, at prísurin á byggitilfari og tann høgi húsaprísurin høvdu lækkað munandi, um rentustuðulin varð tikin av. Øll, sum hava keypt byggitilfar uttanlands, eru greið yvir, at byggitilfar er kanska eini 30-40 prosent ov dýrt í Føroyum. Varð ein slík leið vald, átti sjálvandi ein skiftisskipan verið gjørd fyri øll tey, sum hava sethúsalán í dag, soleiðis at tey ikki verða kollrend fíggjarliga.

Hvørki vanligi arbeiðarin, útróðrarmaðurin, handverkarin ella starvsmaðurin hava fingið búskapin upp á kók. Hann koyrir hvørki í dýrum BMW, Audi, Passat, Saab, Peugot, Avensis ella í dýrum jeep´um. Nei, tað eru tey háløntu, fólk í slíkum vinnum, sum hava fleiri frádráttarmøguleikar, og mong av teimum, sum hava fingið avskrivað skuld, sum í dag gera sær dælt. Tettið tí heldur skattalóg, ansið eftir svarta arbeiðnum, og kannið eftir, um rentustuðilin verður misbrúktur við hjálp frá peningastovnum!

Sosialurin

Viðmerking:

Á skeivari leið

Harra Karsten Hansen, tú gert tínum egnu veljarum og sostatt tjóðveldisflokkinum eina bjarnatænastu, tá tú boðar frá, at tú ætlar at lækka rentustuðulin og innføra bundna uppsparing. Tú rakar tann frammanundan hart trongda sethúsaeigaran sum hevur A-inntøku. Tann fjøldin yvirupphitar ikki nakran búskap. Tann fjøldin betalir okursskatt. Tann fjøldin hevur ein roknskap, sum hárfínt balanserar. Tað er Palleba vit tosa um.

Tín ætlan kundi verið ein fólkafloksætlan, tí Palleba er ikki fólkafloksveljari.

Gamaní ráðg. nevndin, landsbankastjórin og tú studera forbrúkskurvar, sum vísa beint uppeftir. Men ger tær ómak og finn ta fjøldina, sum skapar yvirforbrúkið. Hon finst. Tá ert tú á rættari leið.

Tórshavn 17. august 1999
Kristian Lamhauge

Ein heilsan til Jonhild Eysturberg á 25 ára starvsdegi hennara

»Tíðin rennur sum streymur í á!« Hetta mugu vit tíðum ásanna.

Jonhild hevði nú tann 18. august starvast sum heimahjálpari í 25 ár, og hon hevur havt manga strævna løtuna í hesum yrki, men eisini manga hugnaliga stund saman við teimum eldru og starvsfeløgum sínum annars.

Áhugavert kann vera at líta aftur á teir »góðu, gomlu« dagarnar undir Heimahjálparaskipanini. Ikki varð hugt so nógv at klokkuni, og tann sosiala samveran var stórur partur av arbeiðinum. Tey, ið fingu hjálpina, vóru væl nøgd, og tað vóru heimahjálpararnir eisini í arbeiði sínum. At hjálpa og lætta um eftir besta førimuni var setningurin. Ikki varð spart við reingerðini og við hinum húsarbeiðinum. Sum dømi kunnu nevnast at baka, elta breyð, vaska vindeygu, strúka gardinur, taka upp slakt, vaska klæði, gera mat o.s.fr. Tað var eisini so, at heimahjálpin setti æru í, at húsið, har hon kom, skein á hvørjum spreki, áðrenn hon fór út aftur. Afturat øllum hesum kom eisini røktin av sjúkum og ofta sera »tungum« fólki, ið var sera krevjandi starv.

Nú vita øll, at rákið gongur øvutan veg. Sparing og aftur sparing og samanlegging av stovnum hevur broytt hesa skipan til bert ein viðfáning av tí, hon einaferð var.

Jonhild hevur stríðst sum heimahjálp í øll hesi ár, og tað hevur hon gjørt til lítar. Hon er eitt satt »lívsstykki«, sum dugir at fáa sólina at skína, har hon kemur. Hon er kvik og røsk og stuttlig at vera saman við. Stóran áhuga hevur hon í tí, sum rørir seg í samfelagnum, og tað dámar eisini teimum, ið hon hittir í starvi sínum sum heimahjálp.

Jonhild hevur sitið í nógv ár í nevndini í Heimahjálparafelagnum. Hon er álitiskvinna hjá teimum, ið arbeiða í Hvalba. Eisini fæst hon við at vera skeiðlærari hjá UV (Upplýsingarfelagsskapi verkamanna), tá ið høvi býðst. Nú hevur Jonhild havt 25 ára starvsdag, og eg vil ynskja, at Harrin unnir henni heilsuna og nógv góð ár afturat í starvi sínum sum heimahjálpari.

Undirritaða takkar fyri manga hugnaliga og minnisríka løtu og fyri gott vinalag og trúfesti í mong ár.

Sunneva Tyril

Lions Club í Klaksvík



Nú er dagurin ásettur nær norðoyingar kunnu royna, um júst teirra lykil passar.

Norðoyingar hava nú í einar tríggjar mánaðar kunna keypt sær lykil til skootaran, sum Lions Club í Klaksvík hevur stillað út við Statoilstøðina. Einki endaligt dato hevur verið sett á nær tey, sum hava keypt, kunnu royna um júst teirra lykil passar til, men nú frættist frá Lions Club, at fólk kunnu royna lykilin leygardagin 18. september.

Skootarin, sum hevur eitt virði á uml. 20.000 kr, stendur sum sagt við Statoilstøðina og kunnu lyklar á 50 krónur keypast inni í Statoilstøðini.

18. september kunnu so tey, sum hava keypt lykil, royna um júst teirra passar. Tann sum hevur lykil sum passar til - og sostatt vinna skootaran.

Tað eru enn nakrir lyklar eftir, og vónar Lions Club, at norðoyingar stuðla tiltakinum so mikið væl, at allir lyklarnir verða seldir. Allir peningurin, sum kemur inn, fer til vælgerandi endamál í Norðoyggjum.

Hevur tú ikki fingið
tíðindablaðið **sosialin**
Vit gera alt, hvat vit kunnu, fyri at haldarar fáa leygardagsblaðið til tíðina. Men villur kunnu koma fyri, og um tú ikki hevur fingið blaðið fríggjakvøldið, ring so til Eyðbjart Danielsen, tel 214502, so vit kunnu syrgja fyri, at tú fært blaðið
sosialurin

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri bróður, svágur og gubbi,

ÓLAVUR LARSEN
Tórshavn

andaðist í heiminum, 55 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag, 20. august, kl. 16.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 21. august kl. 13.00.

Familjunnar vegna

Hansina, Petry og Lauritz

Tey, ið vilja minnast Ólav við kransum og blómum, kunna í staðin lata eina gávu til Hjartafelagið, konto í peningastovnunum.